


*Ford Tourneo Connect. Lennard Petdersen, sølumaður hjá P/F Wenzel, sýnir her bilin fram*

# Ford Transit Connect og Tourneo Connect

**Ford eru komnir á marknaðin við einum heilt nýggjum bili, ið verður gjørdur í tveimum útgávum. Talan verður um vørubilin Transit Connect og persónbilin Tourneo Connect**

Bilar
*Magnus Gunnarsson*

Bilarnir verða gjørdir á eini Ford verksmiðju í Turkalandi. Transit Connect er ein rúmligur vørubilur. Vørurúmið er so stórt at pláss er fyri tveimum Euro-plattum. Bilurin verður gjørdur í eini styttri og eini longri útgávu. Totalvektin í longru útgávuni er 2,3 tons. Í standard útgávuni er bert ein dragihurð høgrumegin, men bilurin fæst við dragihurðum á báðum síðum, soleiðis at vørurúmið er lætt at koma til og arbeiðsvinarligt.

Transit Connect bleiv valdur til »Van of the Year 2003« í Evropa.

**Tourneo Connect**

Persónbilurin Tourneo Connect er ein rúmligur 5 persónabilur við stórum viðførisrúmi. 1.8 litur TDCi dieselmotorurin hevur 90 hk. Bilurin fæst eisini við bensinmotori. FDM hava royndarkoyrt bilarnar, og lata teir væl at koyrieginleikunum og bilunum annars. Sum í øllum nýggjum MPV bilum er nokk av hyllum og skuffum til at leggja lutir frá sær. Hóast Transit Connect er vørubilurin burturav, er Tourneo Connect lættur at gera um til vørubil, tað kann gerast við at leggja baksetrini niður ella at taka tey úr bilinum.

Ford Tourneo Connect TDCi kostar 249.000 krónur. Vørubilurin, Ford Transit Connect fer at kosta umleið 150.000 krónur.



*Ford Tourneo Connect er arbeiðsvinarligur og lættur at koma úr og í*



P/F Wenzel:

# Rieger-styling til flest øll bilmerki

**At styla bilar hevur verið so kostnaðarmikið, at tað eru fá sum hætta sær undir tað, hóast tað er dreymurin hjá teimum flestu. Hjá P/F Wenzel hava teir gjørt avtalu við týsku Rieger-styling verksmiðjuna um, at teir kunnu selja stylingset til øll bilmerki**

Bilar
*Magnus Gunnarsson*

Vit hava enn einki orð fyri styling á føroyskum, kanska tað kemur nú teir hjá P/F Wenzel hava gjørt avtalu við týsku Rieger styling verksmiðjuna. Avtalan gongur út uppá at teir kunnu selja og montera stylingsett til flest øll bilmerkir. At styla bilar merkir at bilurin evt. verður senkaður og fær starmmari undirvogn, t.v.s. at hann d.t. fær lægri og strammari fjaðrar og onnur upphang, størri alufelgur við lágprofil dekkum, sporingin verður annarleiðis o.s.fr. Bilurin fær t.d.spoilara á baklúkuna, aðrar kúfangarar við innbygdum spoilara og síðuskjúrt við gáttpanelini. Frá P/F Wenzel verður sagt at styling-settini verða seld til nógv lægri prís enn vit eru von við her hjá okkum.

*Ford Focus við Rieger styling*




# Ford Ranger Super Cab 4x4




*Her er Jógvan Højgaard, sølumaður hjá P/F Wenzel við Ford Ranger Super Cab*

**Ford Ranger verður gjørdur sum 4x4 í útgávunum í trimum ymiskum útgávum, Super Cab, Double Cab og XLT Double Cab. Ranger er ein væl egnaður arbeiðsbilur, ið lastar upp til 1,2 tons.**

Bilar
*Magnus Gunnarsson*

Ford Ranger er ein 4x4, ið er væl egnaður sum arbeiðsbilur. Ranger fæst við trimum ymiskum kabinu møguleikum. Síðuhurðarnar kunnu latast upp uppá tveir ymiskar mátar, t.v.s. at tær eru hongdar framman sum vanligt ella at ongin mittarstólpi er millum hurðarnar.

Við ongum mittarstlólpa er bilurin sera brúkaravinarligur og lætt at koma inn aftan fyri forsetrið. Allar útgávurnar sama motor, ein 2,5 litur 4 syl. turbodiesel við intercoolara og 109 hk.

Bilurin lastar upp til 1,2 tons



*Eingin miðstólpi er millum síðurhurðarnar*

**Ford Ranger Super Cab 4x4**

Motorurin
2,5 litur 4 syl. diesel við 109 hk

v. turbo og intercoolara

Longd 501,2 cm
Breidd 174,0 cm
Hædd 174,0 cm
Aksilfrástøða
300,0 cm

Prísur
kr. 174.200 u / mvg

kr. 217.000 v / mvg

Søluumboð
P/F Wenzel

Akarnesgøta

FO-100 Tórshavn

Tel. 354500

www.wenzel.fo